gult cyan magenta svart

Bæ›i Jákup og Todi teljast millum teir bestu í Danmark

Eftir javnleikin í Parkini setti TV3 sjónvarpsrásin bá›ar føroyingarnar á vikuli›i› hesa fer›

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Bæ›i Jákup og Todi komu hetta vikuskifti› á »ugens hold« hjá sjónvarpsrásini, TV3

Føroyskur fótbóltur hev›i tvey umbo› í Parkini seinnapartin sunnudagin. Og ta› vóru vor›in sum umbo›. Eftir 1-1 javnleikin millum FCK og Herfølge setti TV3 sjónvarpsrásin bæ›i Herfølge málverjan, Jákup Mikkelsen, og FCK mi›vallaran, Toda Jónsson, á li›i›, sum teir valdu millum allar spælararnar, i› spældu í superliguni sunnudagin.

Hetta var anna› vikuskifti› á ra›, at Jákup Mikkelsen var á vikuli›num. Todi Jónsson var ikki á vikuli›num í sí›stu viku. FCK spældi ikki á útivølli ímóti FCM fyrrenn mánakvøldi›. Ummæli›, sum Todi fekk ta fer›ina, var so sannførandi, at eingin sum helst ivi er um, at hann hev›i veri› á li›num, um dysturin hev›i veri› spældur sunnudagin.

Hvønn sín hálvleik

John Faxe Jensen, venjarin hjá Herfølge, hev›i tosa› vi› stórum bókstavum, á›renn bygdali›i› úr Herfølge kom til høvu›ssta›in. Hann helt ikki, at hugbur›urin og avrikini høvdu veri› nóg gó› seinastu vikurnar. Tølini siga, at hann hev›i grein í sínum máli. Herfølge hev›i bara fingi› tvey stig í fimm landskappingardystum, og hóskvøldi› taptu teir 5-0 í Aten.

Eftir málleysa javnleikin fjaldi Herfølge venjarin ikki yvir, at hann var nøgdur vi› avriki› og úrsliti›:

– Vit stríddust sera væl, og eg eri serliga væl nøgdur vi› avriki› í 1. hálvleiki, seg›i Herfølge venjarin.

FCK venjarin, Roy Hodgson, helt, at hansara li› hev›i veri› omaná í 2. hálvleiki, og hann helt, at um ein vinnari skuldi havt veri›, so skuldu ta› havt veri› hansara menn:

– Í 1. hálvleiki spældu vit ov seint, men ta› var nógv betri eftir ste›gin, sta›festi venjarin, hvørs li› ikki hevur tapt sí›ani 20. august.

Jákup

Fer› eftir fer› vóru bo› eftir Jákupi Mikkelsen, sum var sera sannførandi á strikuni og í mann móti manni stø›um. Í sí›stu løtu hev›i FCk eina gó›a roynd, men Jákup tveitti seg út móti stólpanum og helt bóltinum.

Jákup krevur nógv av sær sjálvum, og hann var ikki nøgdur vi› sín lut, tá FCK í 59. minutti javna›i til 1-1. Jákup fór út úr málinum og boksa›i frísparksinnlegg burtur, men bólturin fór bara út ímóti brotssparksblettinum, har stóri sviin, Petrick Simpson, flukta›i í máli›.

Todi

Serliga í 2. hálvleiki var Todi Jónsson, sum var á vøllinum allar 90 minuttirnar, ey›s‡ndur. Hann hev›i ikki stórvegis trupulleikar at bróta ígjøgnum í vinstru sí›u, samanspæli› vi› Niclas Jensen var, sum ta› átti at vera, og Todi átti sí›sta fótin á fleiri innleggum, men hann setti ongantí› gamla li›felagan í Herfølge málinum á serligar royndir.

Tólv minuttir undan dystarenda var li›forma›urin hjá Herfølge, Thomas Høyer, so miki› har›ligur í einari takling ímóti Toda Jónsson, at dómarin vísti honum gula korti›. Herfølge li›forma›urin hev›i longu sæ› gula korti› í 1. hálvleiki, og so noyddust Jákup og teir sí›stu tólv minuttirnar at strí›ast tíggju ímóti ellivu.

Málini

Herfølge kom á odda í 21. minutti. Bo Henriksen tveitti seg fram og stúta›i innlegg úr vinstru frá svenskaranum, Patrick Bengtson, í máli› aftanfyri unga FCK málverjan, Rune Pedersen.

Bo Henriksen hev›i í 2. hálvleiki gyltan møguleika at leggja Herfølge framum 2-1, men í leysari stø›u mitt fyri málinum, sendi hann upp um.

Frísparksinnleggi›, sum var orsøk til FCK máli›, leg›i Donatas Vencivicius innfyri máli›.

14.487 ásko›arar vóru í Parkini, og teir flestu vóru ikki nøgdir, tá teir fóru avsta› aftur. Ta› vóru teir, sum tóku á vi› FCK. Herfølge ásko›ararnir vóru nøgdir. Avriki› bo›a›i frá betri tí›um, sjálvt um Herfølge framvegis er skeivu megin ni›urflytingarstrikuna.

SOLAR FØROYAR

Starvsfólk søkist at byrja skjótast

Arbeiðsuppgávur:
Talan er um fjølbroytt arbeiði í umfatar sølu av alarmútgerð, edv, tele og alt tað ein elinnleggjari hevur brúk fyri.

Førleikakrøv:
Kunnleiki innan handil hevur fyrimun.

Fyrispurningar og umsókn verður at senda til:

Solar Føroyar
Postboks 105
Brekkutún 2
110 Tórshavn
Tlf. 317933

Óli var skaddur

AGF megna›i fyri a›ru fer› á ra› at senda oddali›i› úr aftur Århus vi› ongum stigi

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Fótbóltur er eitt undarligt spæl. Eftir at AGF í fyrstu umførunum eftir summarste›gin stó› seg væl, ste›ga›u teir fullkomuliga upp, og so var› tosa› um kreppu og húsagongd í AGF, sum eingin vildi vita av.

Seinastu stóru vikuna er vent upp og ni›ur upp á hetta. Næstsí›sta sunnudag sendu teir oddali›i› í superliguni, Lyngby, úr Århus vi› 5-2 tapi. Sí›sta sunnudag var Brøndby oddali› í superliguni, men ta› tóktust teir í AGF ikki at hugsa so nógv um. Í hvussu so er vunnu teir 2-0 á Brøndby.

Óli Johannesen var ikki í hópinum hjá AGF. Sambært heimasí›uni hjá AGF var orsøkin tann, at føroyski landsli›sma›urin hev›i ein snudd at dragast vi›.

Hjá AGF venjaranum er stø›an ein heilt onnur, enn hon var fyri stuttari tí› sí›ani. Nú eru næstan allir spælararnir tøkir. Sunnudagin spældu teir somu ellivu fyri AGF, sum eisini vunnu á Lyngby. Hetta var fyrsta fer›in, at ta› bar til at seta sama li›i›.

Í oysandi regni stríddust AGF menninir um hvønn tan einasta bólt. Ta› resta›u tólv minuttir, tá teir fingu hol á. Kenny Thorup skora›i í kontraálopi, eftir at Brøndby fleiri fer›ir hev›i veri› tætt vi› at fáa mál.

F‡ra minuttir seinni var› heimasigurin sligin rimmar fastur. Lennart Bak, sum bara fimm minuttir frammanundan var komin á vøllin, var púra blankur, tá hann mitt fyri málinum st‡rdi bóltinum dygst inn vi› stólparótini.

AGF sigurin hev›i vi› sær, at Óli Johannesen og teir nú eru tr‡ stig omanfyri ni›urflytingarstrikuna.

AGF er á fjór›i ni›asta plássinum.

Hini úrslitini

Umframt javnleikin millum FCK og Herfølge og heimasigrarnar hjá OB og AGF á ávikavíst Viborg og Brøndby, vóru tveir a›rir landskappingardystir sunnudagin. Í Aalborg var undirhaldsvir›i› ógvuliga høgt. Tá bara fimm minuttir vóru eftir, var Silkeborg á odda 4-2, men ta› eydna›ist heimali›num at javna til 4-4.

Í Haderslev kiksa›i ta› enn eina fer› hjá AB, sum hevur sta›i› seg heilt illa, sí›ani teir ey›m‡ktu B36 í UEFA Cup. Úrsliti› var 1-1. Haderslev hevur framvegis ikki vunni›, men teir hildu, at fjór›i javnleikurin fór at styrkja um sjálvsáliti›, eisini tí at hetta var onnur fer›in á ra›, at teir ikki taptu.Í gjár spældi Lyngby ímóti FCM. Um anna› li›i› vann, so var› ta› n‡tt oddali› í superliguni, har FCK framvegis telist millum bestu bo›ini at vinna meistaraskapin.

Hodgson kennir væl til meldurin

Venjarin hjá Toda Jónsson letur seg ikki taka av fótum av, at hann nú er høvu›sleikari í fjølmi›lasøgu um venjarastarvi› hjá eingilska landsli›num

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Hjá Toda Jónsson og li›feløgunum í FCK gongur lívi› sína vanligu gongd. Teir venja hvønn dag og onkra fer›ina venja teir tveir fer›ir. At teir ikki fingu tr‡ stig í fyrradagin var ikki ta›, sum teir høvdu ætla›, men teir eru framvegis vi› í toppinum, og nú eru meiri enn tveir mána›ir sí›ani, at teir sí›st taptu.

Todi Jónsson hevur fleiri fer›ir her í bla›num sagt, at høvu›sorsøkin til, at teir hava sta›i› seg so væl í heyst, er n‡ggi venjarin. Somu ásko›an hava a›rir FCK spælarar givi› til kennar í donskum fjølmi›lum. Tí er ta› ikki at undrast á, at FCK spælararnir vóna, at Roy Hodgson ver›ur í danska høvu›ssta›arfelagnum og ikki gerst venjari hjá eingilska landsli›num.

Fjø›urin og hønurnar

Gamla søgan hjá H. C. Andersen um fjar›arnar, sum gjørdust til fleiri hønur, er ikki langt burtur, tá Roy Hodgson grei›ir frá, hvussu hann hevur uppliva› alt gorri› um starvi› sum landsli›svenjari hjá Onglandi. Saman vi› svenska Sven-Göran Eriksson, venjara hjá italska Lazio, er Roy Hodgson mest umrødda navni› í hesum sambandi.

– Eg havi sagt vi› eingilskar fjølmi›lar, at um FCK hev›i fingi› ein følara frá FA, so rokni eg vi›, at ta› hev›i veri› lættari at keypt meg leysan av starvinum, enn ta› hev›i veri› at fingi› Sven-Göran Eriksson loystan frá sáttmálanum vi› Lazio ella Arense Wenger leysan frá sáttmálanum, sum hann hevur vi› Arsenal. Alt anna›, sum eg eri endurgivin fyri at hava sagt, veit eg einki um, seg›i FCK venjarin í vikuskiftinum.

Ikki ókent

Roy Hodgson liggur ikki í andvekri, nú hann er komin í brennidepulin á ítróttarsí›unum kring allan heimin.

– Hetta er ikki anna›, enn ta›, sum eg stø›ugt upplivdi, tá eg var venjari í Italia. Tí veit eg akkurát, hvat eg skal leggja í alla umrø›una, og hetta hevur einki árin á dagliga virki hjá okkum í FCK, sigur Roy Hodgson.

FCK venjarin er gla›ur fyri, at lívi› í danska fótbóltsheiminum er, sum ta› er:

– Hesar tólv vikurnar, sum eg havi veri› í FCK, hava kenst sum frítí› afturímóti tí, sum eg á›ur havi roynt. T. d. í Italia er pressan í hølinum alla tí›ina. Her í Keypmannahavn kemur ta› fyri onkra viku, at bara ein einstakur tí›indama›ur ringir mitt í viku fyri at frætta, hvussu ta› stendur til undan næsta vikuskiftinum.

Málsviðgeri

Vilt tú vera har nakað hendir?
Vit hava úr at gera og søkja tí eftir einum starvsfólki, sum dámar væl at hava nógv at gera.

Starvið
fevnir um viðgerð av bæði tryggingar- og skaðamálum, og annað vanligt skrivstovuarbeiði.

Vit vænta at tú
hevur útbúgving innan tryggingaryrkið, og hevur praktiskar royndir at hesum øki. Tú hevur gjøgnumgingið stig 3 ella stig 4, á Tryggingarháskúlanum.Tú ert før/ur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, men dugir eisini at samstarva og at vera lagalig/ur.

Vit bjóða tær:
- eitt áhugavert og fjølbroytt starv
- eitt starv saman við einum vælvirkandi starvsliði í einum góðum arbeiðsanda
- møguleika at verða við til at uppbyggja eitt tryggingarfelag
- neyðugar víðariútbúgvingar
- lønar- og setunarviðurskifti sambært sáttmála við Finansforbundet

Starvssetan
Starvið verður sett skjótast gjørligt, men vit eru sinnað at bíða eftir rætta starvsfólkinum.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til Andrass Arge, deildarstjóra, tel. 31 16 77 ella fartel. 21 16 70.

Skrivlig umsókn við CV og prógvum verður at senda til: P/F Trygd, Tórsgøta 16, Postboks 44, FO-110 Tórshavn, Att: Chr. C. Nielsen, stjóra, í seinasta lagi 13. november 2000.

TRYGD

gult cyan magenta svart